## DAGSINS MEINING

# Miðvágs bygd vertur

*Lít yvir Miðvágs bygd*
*einans her tú finnur ta trygd,*
*sum sløkkja hjartans longslu kann,*
*sum tær eymt í bamri brann*

Soleiðis kvøður yrkjarin Jens Eli Ellefsen um heimbygd sína Miðvág, sum verður vertur fyri eina ta seinastu summarstevnuna í ár. Tað er ikki løgið, at yrkjarin er góður við hesa hugnaligu og vøkru gomlu bygdina, sum longu varð bygd í landnámstíð. Bygdin liggur vakurt við sand og vág millum hinar báðar stóru bygdarinar Sørvág og Sandavág.

Seinasta summarstevna, har tjóðarítrótt okkara kappróðurin er við, fyri Ólavsøku verður Vestanstevnan í Miðvági. Vertsbygdin er bygd í góðari menning. Hart rakt, sum hon varð av kreppuni, hevur bygdin reist seg aftur, og hevur hon megnað at gerast eitt gott og dámligt búpláss, har tey ungu hava hug at seta búgv. Bygdaráðið ger nógv fyri trivnaðin og er hópur av grundstykkjum nú byggiklár.

Vágatunnilin hevur grundleggjandi broytt fortreytirnar fyri bygdasamfeløgunum í Vágum. Tunnilin hevur ómetaliga stóran týdning fyri vinnulív, útbúgving, arbeiðsmøguleikar og trivnað í oynni. Eitt, sum eyðkennir bygdirnar í Vágum, er samstarvið á mongum økjum. Miðvágur og Sandavágur hava felags skúla og ítróttarhøll, allar kommunurnar hava felags læknamiðstøð o.m. a. felags.

Miðvágur er gomul mentanarbygd og hevur hon fostrað nógv mentafólk. J.C. Svabo, Rasmus á Háskúlanum, Mikkjal á Ryggi, Òlivar á Ryggi, Móðir í Kálvalíð, Gudmund Brunn og mong onnur. Eisini í nútíðini hevur bygdin yrkjarar, tónaskøld og listafólk - eingin nevndur, eingin gloymdur. Miðvágur røkir væl síni fornminni og gestirnir hava høvi at vitja húsini, har Beinta búleikaðist í Kálvalíð. Hesi hús, ið eru eini tey elstu í Føroyum, eru í sera góðum standi. Eisini húsini á gomlu prestagarðsgrundini í Jansagerði eru vorðin partur av Miðvágs Fornminnissavni. Barnaheimið hjá Mikkjali á Ryggi er varðveitt og verður væl umsitið av Vága Dansifelag. Miðvágur varðar væl um síni minni. Á kirkjugarðinum stendur minnisvarði yvir sjólætnar og falnar í bjørgum og fyri stuttum er model av Nýggjaberg, sum fórst undir krígnum og nøvnini á manningini, sett upp í forkirkjuni.

Miðvágur hevur altið verið ein framburðsbygd. Hon hevur átt og eigur framvegis framskygd vinnulívsfólk og ellis- og røktarheimið, sum var hitt fyrsta nútímans røktarheim í Føroyum, er eitt stórt prýði fyri bygdina. Jú nú er bara hjá stevnmugestum at halda leiðina til Miðvágs. Sambandið er gott, fókið er blítt og nógv er at uppliva í hesi gomlu, søguríku bygd og tó so modernaðu bygd.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# HEIMILDARLOYSI

**Heri Mohr**



Undirritaði hevur skrivað eitt ótal av lesarabrøvum um blokkstuðulin frá ríkiskassanum til landskassan. Støðið undir øllum hesum lesarabrøvum er ósanna og villleiðandi indoktrinering, sum serliga farnu 7 árini er farin fram á okkara politiska hermóti við blokkstuðlinum sum "ondets rod".

Tað er ikki lukkuligt, sum hesin blokkur hevur verið og framhaldandi verður skammfarin, hóast tað, sum er eftir av honum, er markað og ikki ætlað til annað enn til okkara heilsuverk og almannaverk, - altso til gomul, sjúk, avlamin, brekað og tarnað.

Vit kunnu taka nøkur fá dømi:

- Tá ið landsstýrisins propagandarit Frá heimastýri til fullveldi kom í hvørt heim einaferð í ár 2000, vórðu álvarsligar frásagnir serliga á síðu 25 og 26 um blokkstuðulin, sum ikki høvdu hald í sannleikanum.

- Á einum politiskum flokstingi í Hósvík fyri tveimum árum síðani varð staðfest, at síðani 1993 eru bert 10% av blokkinum nýtt. (Á sama tingi varð kunngjørt, at tað eru "tey klókastu, tey best lærdu og stinnastu, ið velja Tjóðveldisflokkin").

- Og nú ein dagin fingu vit at vita frá Annitu á Fríðriksmørk, løgtingslimi, at blokkurin fer í landskassan mest sum av tilvild, hann er ikki ætlaður til nakað sum helst minst av øllum til vælferðina. Ein maður, sum hevði lisið hennara grein, helt fyri, at hon kundi ikki hava sett seg nóg væl í blokkproblamitikkin, tí tað, hon skrivar, er langt frá sannleikanum og veruleikanum. Betri heimaarbeiði hevði í hesum føri verið Annitu á Fríðriksmørk til fyrimunar, - og hetta er ikki sagt niðrandi.

Lat okkum við bindi fyri eygunum tríva í blokkin og vita, hvat vit kunnu hála fram í ljósið.

### Ríkishospitalið!

Har vóru vit heppin, tí júst Ríkishospitalið er sorgarbarnið, sum voldar loysingarmonnum høvuðbrýggj. Ríkishospitalið er jú olmussa, fátækrahjálp, táta v.m. hava vit áhaldandi fingið at vita. Sum um vit eru tornom skúlabørn.

Sannleikin um Ríkishospitalið er hesin: Í mong Harrans ár hava føroyingar fingið ókeypis sjúkraviðgerð á Ríkishospitalinum. Tað, sum Ríkishospitalið kravdi fyri sjúklingar úr Føroyum, varð fyri nógvum árum síðani avklárað millum sjúkrahúsið og avvarðandi ráðharrastovu (ministerium).

Ríkishospitalið var so statt ikki at finna í løgtingsins fíggjarlógum ella landskassans roknskapum fyrr enn í 1988, tí tá kom tað í blokkin saman við so nógvum øðrum, sum ríkiskassin rindar alt ella partar av. Í 1988 kom so sum sagt Ríkishospitalið í blokkin við 22 milliónum, og síðani tá hevur landskassin samsvarandi rokning frá sjúkrahúsinum goldið fyri viðgerð av sjúklingum úr Føroyum. So einfalt er tað.

Í avtaluni millum ta donsku stjórnina og landsstýrið tann 9. mars 1987 er m.a. tilskilað, at upphæddin í blokkinum "beror på opgørelse af udgifterne ved indlæggelse på Rigshospitalet".

Men nú kemur gysarin:

Frá 1988 til 1999 var altíð samsvar millum tað, ið Ríkishospitalið kravdi og tað, ið var í blokkinum til sama endamál, men í 2000 kom vend í. Samsvarið millum hospitalið og blokkin helt uppat. Gloppið millum blokkstuðulin og útgjaldingarnar til Ríkishospitalið øktist alt meira og meira.

Í árunum 2000-2004 (5 ár) hevur landskassin goldið Ríkishospitalinum umleið 413 mió., meðan blokkurin í sama tíðarskeiði hevur innihildið umleið 280 milliónir til viðgerðir á nevnda sjúkrahúsi. Her er ein munur upp á umleið 133 milliónir, sum landskassin onkursvegna hevur lagt út! Men hvussu við lógini, hvar er heimildin hjá landsstýrinum at rinda tað, ið ríkiskassin veruliga eigur at gjalda?

Hvussu hetta hongur saman, hava vit skattaborgarar náturligt krav upp á at vita.

Nú landskassin er illa fyri, fær ikki endarnar at røkka saman, er tað sjálvsagt, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum greiðir Føroya løgtingi frá, hvat niðurfrystingin av blokkinum hevur kostað landskassanum, og hvørji ráð eru at taka til, fyri at vit, sum búgva í Føroyum - serliga gomul, sjúk og avlamin - kunnu sleppa úr ótryggleikanum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.